Sosialurin

# VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 26. november 2004



**Vísindi: Ringanna harri**
Í juli í ár kom rúmdarkanningarfarið Cassini-Huygens til Saturn eftir at hava verið á ferð í 7 ár. Kanningarfarið, sum er tað tyngsta, sum nakrantíð er sent út í rúmdina, hevur lendingartólið Huygens við sær, ið eftir ætlan skal seta seg á tann størsta av teimum 31 mánunum, Titan, tann 14. januar komandi ár.
**Týsdag 30. kl. 19.25**



**Orkidutjóvurin**
Charlie Kaufman er í ferð við at lesa ta nógv róstu skaldsøguna eftir Susan Orlean um tann løgna orkidu-savnaran John Laroche. Men hetta gerst sera torført, tá tvíburðabróður hansara flytur inn við tí ætlan at skriva eitt filmshandrit. Við Nicholas Cage og Meryl Streep, leikstjórnað hevur Spike Jonze.
**Leygardag 27. kl. 21.00**



**Fótbóltur: Liverpool - Arsenal**
Beinleiðis sending av Anfield Road. Liverpool tekur ímóti meistarunum frá í fjør Arsenal. Meðan Liverpool í løtuni liggur á 8. plássi, so stríðist Arsenal við at koma framum oddaliðið Chelsea. Hetta er 15. leikumfar í bestu ensku deildini, Premiership.
**Leygardag 27. kl. 15.55**

**Jólagidd**
Hvønn dag frá 1. til 24. desember klokkan hálvgum sjey sendir Sjónvarp Føroya Jólagidd. Hetta er jólasending fyri børn – og hon eitur Jólagidd, tí tað ljóðar kul, og tí gidd merkir nakað flykrandi og blaktrandi, og tað er júst tað, sum fer at henda: Her fer at vera blaktran av ymsum slag.
**SvF allar dagar kl.18.30**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**